Ein veruligur trupulleiki

Hondbóltssambandið fer ikki av sínum eintingum at áseta nýggjan dyst millum StÍF og Neistan, men tey ásanna, at talan er um ein ítøkiligan trupulleika, sum nakað má gerast við

HONDBÓLTSLÓGIR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Kappingarleiðari hjá Hondbóltssambandinum er Jógvan Martin Mørk. Og tá vit hósmorgunin vístu honum á boðini, sum StÍF hevði fingið úr Noreg, og á støðuna, sum føroyska Dómarafelagið hevur tikið í málinum, er hann skjótur at staðfesta, at her er talan um ein trupulleika.

– Tað er einki at ivast í, at her eru nøkur viðurskifti, sum mugu betrast. Talan er fjórðu hendinga í ár, har talan er um trupulleikar í samskiftinum millum dómaraborð og dómarar. Hetta skal ikki skiljast sum nøkur atfinning, tí í flestu førum er talan um góð fólk við drúgvum royndum, sum sita við dómaraborðið, men tá slík mistøk henda, so mugu vit royna at fáa tingini í rættlag.

– Og tað er einki at ivast í, at talan í hesum førinum er um eitt sera óheppið mistak, sum møguliga kundi ávirkað endaliga úrslitið. Men kanska kundi trupulleikin her verið loystur við nøkrum so einføldum sum einum betri horni til dómaraborðið, staðfestir hann.

Og tá vit at enda spyrja, hvørt HSF kanska fer at taka málið upp til viðgerðar, soleiðis at møguligur nýggjur dystur kann ásetast, svarar kappingarleiðarin, at tað fara tey ikki.

– Talan er jú um hypotetiskar spurningar um, hvat kundi hent. Tað er tað eisini í fleiri av hinum førunum, har mistøk hava verið í samskiftinum, og vit kunnu ikki krevja, at allir hesir dystir skulu leikast umaftur. Men vit mugu bara fyribyrgja, at slíkar hendingar taka seg uppaftur, sigur Jógvan Martin at enda.

Teir fýra dystirnir, sum kappingarleiðarin sipar til, eru annars hesir:

Søljan-StÍF (kvinnur), har StÍF skifti leikara inn, sum ikki varð skrásettur á dómaraseðlinum. Nakað sum dómaraborðið skuldi gjørt vart við.

Kyndil-Neistin (menn), har leikari hjá Neistanum ikki fekk reytt kort, hóast hann fekk triðju útvísingina. Hvørki dómarar ella dómaraborð varnaðust hetta.

KÍF-Neistin (menn), tá Neistin fekk time-out, hóast teir mest sum samstundis mistu bóltin til KÍF. Eftirfylgjandi dømdu dómararnir brotskast til KÍF, tí dómaraborðið hevði tikið upplagdan møguleika frá teimum.

Og so dysturin á Skála sunnudagin, har Neistin fekk góðkent mál, hóast teir undan hesum høvdu viðið um time-out

Framhald av síðu 19

Somikið greiðar eru reglurnar um, hvussu hondbóltsdómarar skulu fyrihalda seg til time-out reglurna, og hetta er nakað, sum hesi seinastu samdøgurini hevur verið tosað dúgliga um inni á Skála.

Orsøkin til hetta er hendingin í dystinum millum mansliðini hjá StÍF og Neistanum seinasta sunnudagin. Við 45 sekundum eftir og støðuni, 28-27 til Neistan, bað Neista-venjarin um Time-out.

Dómaraborðið trýsti á floytuna, men ljóðið var ov veikt til at treingja ígjøgnum dunið frá áskoðarunum, og á vøllinum leiktu teir bláu seg fram til møguleika og skoraðu. Eftirfylgjandi var nakað av roki, tá StÍF-leikararnir vildu hava, at málið skuldi kolldømast.

Boðini frá dómarunum vóru tó greið. – Tað eru dómararnir, sum gera av, nær dysturin skal steðgast, og tá hvørki vit ella leikararnir høvdu ánilsi fyri, at time-out varð tikið, so taldi málið við, vóru boðini ta ferðina, og fyri fyrst tóktust øll eisini at seta seg til sættis við hesum.

Men staðfestingin, sum hendan greingin byrjar við, broytir tó um hetta.

Hevur dómaraborðið markerað fyri time-out, so steðgar dysturin. Eisini hóast dómararnir ikki varnast hetta. Tað merkir, at tá dómararnir fyrr ella seinni geva tekin til hetta, skal støðan bakkast aftur til løtuna, har trýst varð á floytuna, og tað, sum hendi í tíðarbilinum fram til markeringina frá dómarunum, er at kalla ikki hent. Undantakið er, um dómarar í hesum tíðarbili hava givið gul kort, tveir fingrar. Tá stendur hetta við, men í aðrar mátar skal dysturin bakkast aftur til útgangsstøðið.

Hetta hava strandingar eisini fingið staðfest frá norska hondbóltssambandinum, sum sigur, at talan her um altjóða reglur, og tí skuldi eingin ivi yvirhøvur verið um, at talan var um eitt dómaramistak, tá málið hjá Neistanum varð góðkent.

Hypotetiskir spurningar

Og tað er heldur einki at ivast í, at talan var um eitt sera óheppið mistak. Skoringin til 29-27 avgjørdi definitivt dystin, og á stigatalvuni var týdningurin av sigrinum eisini sjónligur. Har er tað nú Neistin, sum er næsti avbjóðarin hjá Kyndli, meðan StÍF við trimum stigum upp til oddin ikki kann avgera nakað einsamalt.

Um tann støðan hevði verið øðrvísi, um málið hjá Helga Justinussen ikki varð góðkent, er ein hypotetiskur spurningur. Men tað er greitt, at tey á Skála argast inn á hendan ivan.

Hevði Neistin megnað at skora í nýggjum álopi?

Og um ikki, hevði StÍF so havt tíð til eitt seinasta álop?

Og hevði StÍF so kanska eisini javnað?

Tað eru spurningarnir, sum tey á Skála seta sær, men tey skulu neyvan vænta sær nakað svar. Sum skilst, so hava strandingarnir heldur ikki nakra ætlan um at kæra avgerðina við nýggjum dysti fyri eyga, og í prinsippinum er hetta eisini ov seint, nú meira enn 48 tímar eru lidnir síðani dystin.

Máltindarnir

Kvinnur

Simona Dziugyte	Neistin	153	(25)
Aukse Vysniaskaite	VB	141	(39)
Nicoleta Radu	Søljan	134	(30)
Ioana Rápa	VÍF	121	(27)
Daiva Tuomaite	VB	120	(16)
Katarina Stepanov	Stjørnan	110	(20)
Milica Ergic	StÍF	102	(12)
Sóley Mikkelsen	VÍF	102	(21)
Gurið Mortensen	VB	101	(6)
Joan M. Djordjevic	Stjørnan	96	(38)
Irina Radovici	VÍF	91	
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	84	
Poula D. Olsen	StÍF	82	
Annika Ljósstein	Stjørnan	81	(19)
Heidi Maria Akselsen	Søljan	77	(5)

Menn

Dragisa Stojovic	Neistin	100	(3)
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	100	(36)
Halgir D. Olesen	H71	98	(9)
Blagoje Buha	Neistin	94	(22)
Damir Oros	KÍF	83	(27)
Áki Mørk	Neistin	81	(19)
Ingi Olsen	VÍF	79	(23)
Jacob Jónsson	Kyndil	75	
Petur Martin Poulsen	KÍF	74	
Høgni Klein	Kyndil	72	(2)
Alexandur Johansen	StÍF	72	(27)
Agnar Joensen	VÍF	70	(9)
Gert Hansen	KÍF	66	(3)
Henrik Gerster	H71	66	(24)
Regin Petersen	KÍF	64	(1)

Hondbóltsstøðurnar

1. Deild kvinnur

	dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	8	7	0	1	547	415	132	25
2 VB	7	7	0	0	529	392	137	22
3 VÍF	8	5	0	3	517	426	91	19
4 Neistin	6	3	0	3	452	416	36	14
5 StÍF	8	2	0	6	465	542	-77	9
6 Søljan	7	1	0	6	361	480	-119	4
7 Kyndil	8	1	0	7	338	538	-200	3

1. Deild menn

	dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Kyndil	6	3	1	2	481	449	32	16
2 Neistin	5	4	0	1	427	392	35	14
3 StÍF	6	3	0	3	413	390	23	13
4 VÍF	5	3	0	2	412	376	36	12
5 H71	5	1	1	3	370	428	-58	5
6 KÍF	5	1	0	4	392	460	-68	5

Keðiligt mistak

Eftir at tað er komið fram í ljósmála, at strandingar vóru offur fyri einum dómaramistakið, sum – kanska – kostaði teimum eitt stig, hevur nýggja føroyska dómarafelagið viðgjørt málið.

Og niðurstøðan hjá felagnum er sera greið. Boðini eru, at Dómarafelagið hevur ásannað, at talan hevur verið um eitt sera óheppið mistak, og at talan er um skeivan dóm.

Hinvegin sigur felagið seg ikki vilja leggja seg út í nakað kjak um, hvat víðari skal henda í málinum. Tann bólturin liggur hjá Hondbóltssambandinum, eru greiður boðini frá dómarafelagnum, eftir at teir høvdu viðgjørt spurningin hósmorgunin.

-jm

Jákup fær møguleikan í dag

Landsliðsleikarin Jákup á Borg fær í dag høvi at vísa venjara sínum, hvørjar dygdir hann hevur

Liðið hjá Jákup í Borg, OB, spælir í dag dyst móti svenska liðnum Djurgården í einum dysti í sambandi við eina lítla kapping í Århus. Venjarin hjá OB, Troels Bech, sigur við útvarpssendingina OB on Air, at Jákup fær møguleikan í dystinum í Århus. Venjarin sigur eisini, at tað er umráðandi at fáa Jákup við til dyst beinan vegin, so at hann finnur seg til rættis saman við nýggju liðfeløgunum.

-tn

StÍF-Kyndil 32-29 (20-15):

Kyndil í aldudali

Yvir ein breiðan kamb vóru tað strandingarnir, sum vóru omaná í dystinum móti Kyndli

Mynd: Álvur Haraldsen

Mansliðið hjá Kyndli tykist hava rakt eina form-niðurgongd júst nú, teir ikki hava ráð til. Mikukvøldið vórðu teir so dyggiliga settir upp á pláss av StÍF

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Kyndil-StÍF. StÍF-Kyndil. Bara heitið á dystinum hevur tey mongu seinnu árini borga fyri góðsku av slíkum slag, sum sjáldan sæst í føroyskum hondbólti. Onkursvegna hevur tað mest sum altíð lagað seg soleiðis, at dystirnir millum liðini bæði hava átt alt tað, sum áskoðarar tráða eftir at síggja hvønn tann einasta sunnudag. Ferð, dramatikk, gott spæl í bæði verju og álopi blandað saman við framúrskarandi einmansavrikum munnu vera grundelementini í hesum, og tí hevur upplivingin við hesum dystum ofta verið sum at fáa sær ein sjáldsama góðan bita á eini finari matstovu. Stutt sagt reint krás fyri áskoðararnar.

Ikki eins gott

Tað skal tó verða sagt, at í so máta mundi dysturin millum liðini bæði mikukvøldið ikki liva upp til lovandi orðini omanfyri. Til tíðir var talan um gott spæl – serliga frá StÍF – og til tíðir var eisini um reppið, at veruligur spenningur kom í dystin, men heildarmetingin sigur tó, at talan ikki var um ein dyst, sum lyfti seg langt upp um miðalkarakterin, sum føroyskir dystir fáa.

Orsøkin til hetta var kanska longu at finna í fyrstu minuttunum av dystinum, tá heimaliðið alt fyri eitt vann sær eina hampuliga stóra leiðslu. Við góðum verjuspæli og fullari ferð á álopinum var sera tungt hjá einum – hesa løtuna – illa koyrandi Kyndilsliði at fylgja við yvirhøvur. Og nakni veruleikin er eisini, at hevði Kyndil ikki havt fyrrverandi StÍF-málverjan, Johan Danielsen, í málinum hesa løtuna, hevði máltalvan vístnakað heilt annað og størri enn 6-2 leiðslsuna, sum heimaliðið her vann sær.

Kyndil fótaði sær tó nakað, soleiðis at munurin ikki vakt tað heilt stóra eftir hetta. Johan stóð framvegis framúr væl í málinum, og hjálpin frá viðleikarunum batnaði eisini munandi eftir hesa fyrstu løtuna, men framvegis tóktist tó greitt, at strandingar vóru nakað væl betri enn oddaliðið á degnum.

Hálvhjartað

Hóast teir í steðginum vóru aftan fyri við fimm málum, so mundu teir í Kyndli hest ugga seg við minninum um tilsvarandi dystin í grundspælinum, har tað eydnaðist at venda eini annars tryggari StÍF-leiðslu.

Kanska mundi onkur av áskoðarunum eisini fara at hugsa um hetta, tá Kyndil í seinna hálvleiki legði fyri at skjóta trý mál á rað, men leikararnir sjálvir høvdu tó sett í seg, at hetta so ikki skuldi henda aftur. Eftir lítla skelkin vóru teir skjótir at svara aftur. Ikki minst vóru teir báðir Johansenbeiggjarnir í essinum, og kvika fótskifti teirra fekk fleiri ferðir Kyndils-verjuna at líkjast onkrum, sum í besta føri hevði fingið skeivar skógvar á føturnar undan dystinum.

Og hóast Kyndil enn einaferð royndi at svara aftur, nú StÍF hevði vunnið seg átta mál framum, so eydnaðist hetta ongan tíð meira enn partvíst. Eitt skifti varð munurin minkaður niður í fýra mál, men tá Kyndil so misnýtti brotskast, og StÍF í løtunum eftir hetta økti til fimm mál, var liðugt. Hvørki kropsliga ella sálarliga tóktust teir grønu hava nakað sum helst eftir í sær. Teir fingu kanska pyntað um endaliga úrslitið allar seinastu minuttirnar, men tá vóru strandingar langt síðani farnir at gleðast um sigurin, so meira enn ein hálvhjartað royndgjørdist hetta ongantíð.

Í aldudali

Og kanska hevur StÍF við hesum sigrinum aftur meldað seg inn í oddastríðið, har teir annars meldaðu pass seinasta sunnudag.

Sum er, so eru tó framvegis trý stig upp til oddin, so teir skulu í øllum førum hava hjálp, um tað skal koma somikið langt, men við tveimum havnarfeløgunum, sum sínamillum stríðast um oddasessin og einum VÍF-liði, sum loksins tykist vera komið fyri seg, er hendan hjálpin ikki heilt óhugsandi. Spurningurin er so bara, hvørt strandingar sjálvir eru førir fyri at halda støðinum á egnum spæli nóg høgt, soleiðis at teir kunnu gera sær dælt av møguligum mistøkum frá øðrum liðum.

Og so er tað Kyndil. Teir hava alt árið hildið seg frammi á oddasessinum, men onkrusvegna tykist, sum hava teir í ringast hugsandi løtu valt at fara í ein lítlan aldudal. Seinastu dystirnir hava í nógvar mátar verið lítið sannførandi fyri eitt oddalið, og vinnur Neistin væntaða sigurin á KÍF um vikuskiftið, so eru teir heldur ikki oddalið longur. Tá munar tað lítið, at Kyndil hevur verið á odda frá fyrsta til 16. leikumfar, um alt verður tveitt á gólvið seinastu fýra dystirnar!

Dysturin í tølum

StÍF-Kyndil 32-29 (20-15)

Málskjúttar

StÍF: Alexandur Johansen 9(2), Artur Johansen 6, Sveinur Justinussen 4, Mihai Marinescu 4, Andre F. Danielsen 4, Bent Djurhuus 2, Leivur Justinussen 2, Pauli Hansen 1

Kyndil: Josef Abrahamsen 10(6), Jacob Jónsson 7, Jónleif Sólsker 3, Janus Einar Sørensen 3, Hans Áki Dal-Christiansen

Brotskøst: StÍF 2, Kyndil 10

Útvísingar: StÍF 6, Kyndil 4

Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen. Í fleiri førum tóktust avgerðirnar beinleiðis løgnar, og samanumtikið var talan ikki um teirra besta dyst. Kanska eisini eitt tekin um, hvussu trupult tað er hjá einum dómaraparið at skula døma tveir dystir eitt gerandiskvøld.

Lagið má betrast

Skal Kyndil gera sær vónir um FM, má skil fáast á spælið her og nú

HONDBÓLTSPRÁT
Jákup Mørk

Tað varð undan dystinum mikukvøldið roknað við, at nú Janus Einar Sørensen aftur var tøkur hjá Kyndli, fór hetta at betra um møguleikarnar í endaspurtinum, men hóast hetta, so fekst einki stig aftur til Havnar mikukvøldið.

Eftir dystin fingu vit orðið á Janus Einar, og hann var skjótur at staðfesta, at soleiðis sum Kyndil spælir í løtuni, so er langur vegur til nakað gullmerki.

– Eg veit ikki hví, men humørið hjá okkum er snøgt sagt ikki nóg gott í løtuni. Vit hava í alt ár víst – og tað gera vit eisini í løtum í dag – at vit væl kunnu spæla góðan hondbólt. Vit burdu eisini verið uppsettir til dystin í dag, men onkursvegna tóktist tað, sum um vit ikki stríðast nóg væl. Tú skalt ikki spyrja hví, men eg veit bara, at tað er nakað, sum vit hava ráð til, nú bara fýra dystir eru eftir.

Og spurdur, hvussu Kyndil kann lyfta seg upp aftur til seinastu avgerandi dystirnar, eru boðini frá strikuspælaranum greið.

– Vit mugu bara koyra á. Geva okkum fult undir bæði venjing og dysti. Megna vit tað, so hava vit avgjørt møguleikan, sigur altso Janus Einar Sørensen at enda.

– Humørið hjá okkum er snøgt sagt ikki nóg gott í løtuni, staðfesti Janus Einar Sørensen eftir dystin mikukvøldið

Mynd: Álvur Haraldsen